FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

# Vegleiðing til skattaavseting fyri kommunur

Kommunur skulu sambært kontuskipanini avseta fyri skatt, ið ikki er goldin. Hetta skrivið er vegleiðing í, hvussu funnið verður fram til tølini, ið avsett skulu vera.

## Hvussu verður avsett?

Kommunur skulu avseta hvørt ár við ársenda við at brúka STRKT 6191 og STRKT 0339. Hesar báðar konturnar skulu tí altíð javnviga. Kommunur avskriva ikki í sínum bókhaldi, tí TAKS fremur avskrivingina samsvarandi skattalógini.

Kommunur avseta í sínum bókhaldi soleiðis:
Inniverandi roknskaparár: 0 % av saldo hetta árið
1. ár undan inniverandi roknskaparári: 20 % av saldo á ávikavist 0330 og 0331
2. ár undan inniverandi roknskaparári: 40 % av saldo á ávikavist 0330 og 0331
3. ár undan inniverandi roknskaparári: 60 % av saldo á ávikavist 0330 og 0331
4. ár undan inniverandi roknskaparári: 80 % av saldo á ávikavist 0330 og 0331
5. ár og meira undan inniverandi roknskaparári: 100% av saldo á ávikavist 0330 og 0331

Prinsippið verður brúkt fyri bæði persónsskatt og felagsskatt.

Bókað verður við at útreiðsluføra á STRKT 6191 *Avseting móti tapi* og skuldarføra á STRKT 0339 *Avsetingar móti tapi*.

Avsetingin STRK 6191 verður gjørt á rakstrarstaðnum fyri ávíkavist kommunuskatt og felagsskatt.

Saldan fyri einstøku skattaárini kann finnast í leiðslukunningarskipanini (sí vegleiðing niðanfyri).

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • 165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

# Dømi fyri avseting

Eitt dømi fyri avseting verður her gjøgnumgingið:

Við ársenda 2010 sóu saldurnar á 0330 og 0331 soleiðis út býttar á skattaár:

| **Skattaár** | **Upphædd** |
|---|---|
| 2010 | 1.100 |
| 2009 | 900 |
| 2008 | 700 |
| 2007 | 500 |
| 2006 | 300 |
| 2005 og eldri | 200 |
| **Tilsamans:** | **3.700** |

Avsetast skal tí ultimo 2010: (1.100*0 + 900*0,2 + 700*0,4 + 500*0,6 + 300*0,8 + 200*1) = 1.020.

Ultimi árið skal bara bókast munur millum tað, ð var avsett primo og avsetingina ultimo. Um vit siga, at avsetingin primo var 780, skal skattaavsetingin tí vaksa 1.020 – 780 = 240. Hetta verður bókað sum útreiðsla soleiðis:
D:6191 (bókast á høvuðskontur fyri kommunuskatt og felagsskatt alt eftir býti)
K:0339
Upphædd: 240

# Skal ávíst tíðarskeið brúkast?

Skattaavsetingin skal vanliga verða gjørd í tíðarskeið 13 í roknskaparárinum. Til ber tó eisini at nýta tíðarskeið 12 ella tíðarskeið 14.

# Hvussu finni eg tølini?

Í leiðslukunningini kunnu finnast tølini fyri álíknaðan skatt og goldnan skatt ár fyri ár, og við at rokna munin millum hesi bæði, ber til at finna skattaeftirstøðuna fyri hvørt árið.

Í leiðslukunningini verður farið inn á kommunuavrokningina fyri tína kommunu (her verður Fuglafjarðar kommuna brúkt sum dømi):

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

**Føroya Gjaldstova**

**Heimasíður**

Brúkari: Marin Thomsen

Saldoávaring víst

Yvirlit: Heimasíður

**Heimasíður sum Marin Thomsen hevur rættindi til**

203 Y Framroknað Yvirtrekk? Mánaðir Ár Fíggjarstøða (F) Allir kommunuroknskapir

Kommunu avrokning: Fuglafjarðar kommuna, Kommunuavrokning

**Serlig yvirlit**

Kommunuskattur líðað á ár og mánaðir: Fuglafjarðar kommuna v/graf

Á næstu myndini, trýst á 0330 fyri at koma inn á persónsskattin ella 0331 fyri at koma inn á felagsskattin:

**Kommunuavrokning**

Fíggjarár 2012

Tíðarskeið: sjálvvirkið

Kommuna: 4203 Fuglafjarðar kommuna

-

Bókingar skaptar av kommunuavrokning ikki við

Vís samanteljingar: nei

| StRk | Heiti | Salda 05-2012 | Salda 06-2012 |
|---|---|---|---|
| 0330 | Persónsskattur K | -1.121.697,12 | -1.114.258,25 |
| 0330 | Húsaleiguskattur K | -2.025,00 | 0,00 |
| 0331 | Felagsskattur K | -492.742,55 | -492.742,55 |
| 0841 | Kommunuavrokning K | -23.151.042,46 | -23.151.042,46 |
| 0842 | Kommunuavrokning, ikki avroknað K | 81.861,09 | 81.861,09 |
| | Úrslit | -24.685.646,04 | -24.676.182,17 |

Í myndini sum komið verður inn á, ber til at síggja álíknaða skattin útgreinaðan eftir skattaári, við at velja útgreining 1000 (Goldin skattur sæst við at trýsta á útgreining 5000):

**Kommunuavrokning (tíðarskeið)**

Fíggjarár 2011

Kommuna: 4203 Fuglafjarðar kommuna

Strk: 0330 Persónsskattur

Rørslur

-

Bókingar skaptar a

| Útgreining | Heiti | Primo | 01-2011 | 02-2011 | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1000 | Álikning K | -818.100.717,29 | -2.978.718,50 | -3.282.622,10 | -4.279 |
| 5000 | Goldið K | 816.762.101,27 | 3.104.378,16 | 3.294.384,27 | 4.355 |
| | **Tilsamans** | -1.338.616,02 | 125.659,66 | 11.762,17 | 75 |

Á síðuni sæst nú álíknaður kommunuskattur býttur eftir skattaári uppbýtt í primotøl og rørslur í árinum (sí tølini í fyrstu kolonnu aftanfyri punktum):

**Kommunuavrokning (tíðarskeið)**

Bókinga

Fíggjarár 2011
Kommuna: 4203 Fuglafjarðar kommuna
Strk: 0330 Persónsskattur
Útgreining: 1000 Álíkning
Rørslur
-

| Endamál | Heiti | Primo | 01-2011 |
|---|---|---|---|
| 126701.1983 | Vanligur landsskattur, Árið 1983 K | -371.070,20 | 0,00 |
| 126701.1984 | Vanligur landsskattur, Árið 1984 K | -10.871.012,01 | 0,00 |
| 126701.1985 | Vanligur landsskattur, Árið 1985 K | -15.876.265,02 | 0,00 |
| 126701.1986 | Vanligur landsskattur, Árið 1986 K | -17.545.785,44 | 0,00 |

Tølini fyri primo 2011 er sjálvandi soma tølini sum ultimo 2010, og eru tí tølini sum skulu brúkast til at uppgera álíknaða skattin uppbýtt eftir ári per ultimo 2010. Tølini í "Primo"-kolonnuni verða tí sett inn í rokniark, uppbýtt eftir ári. Fyri at lætta um innlesingina í Excel, ber til at trýsta á knøttin ovast í høgra horni og síðani trýsta Excel format - "Innles"




Um Windows er sett rætt upp, skuldi tølini nú verðið innlisin í Excel. Um hetta ikki virkar, so er neyðugt at innlesa í rokniark manuelt.

Á sama hátt verða tølini fyri goldna skattin (útgreining 5000) innlisin í rokniark.

Fyri hvørt ár verður skattaeftirstøðan funnin sum munurin millum álíknaðan og goldnan skatt skattaár fyri skattaár. Samlaða upphæddin, sum skal vera avsett ultimo, verður síðani roknað eftir hvat ár talan er um (0% av ikki-goldna skattinum skal vera avsett, um talan er um inniverandi ár, 20% um 1 ár áðrenn inniverandi ár osfr.).

Fyri at avsetta upphæddin ultimo skal vera røtt, verður bókað munurin millum tað, sum avsett er primo, og tað sum skal vera avsett ultimo.

## Hvussu við samanlagdum kommunum?

Avseting skal sjálvandi gerast fyri allar “kommunur” í kommununi. Til dømis avsetir Klaksvíkar kommuna av fyri Klaksvíkar, Svínoyar og Mikladals kommunur.